# Fýra í einum - nýtt advokatsamstarv

*Mánadagin byrjaðu teir fýra advokatarnir Páll Nielsen, Sigmund Poulsen, Hans Trygvi Teirin og Eyðhild Skaalum nýtt samstarv, sum eftir ætlan skal enda við, at teir koma undir somu lon*



Sveinur Tróndarson

Saman standa vit sterkari ...

Hesi orðini kunnu teir fýra advokatarnir brúka um seg sjálvar nú teir hava gjørt av at ganga saman í samstarv frá mánadegnum 7. januar ar rokna.

Páll Nielsen og Sigmund Poulsen hava hildið til við Hoyvíksvegin, meðan Hans Trygvi Teirin og Eyðhild Skaalum hava húsast í J. H. Schrøtersgøtu. Men nú tey eru farin í samstarv er alt virksemi flutt oman í J. H. Scrøtersgøtu, har tey, fyribils, húsast í tveimum húsum. Nummar 20 og 22.

Vit fingu orð á Páll Nielsen mánamorgunin, og hann segði okkum, at hetta var nakað tey høvdu tosað um í drúgva tíð.

– Vit hava tosað um tað leingi, men tað er ongantíð komið longur. Nú hildu vit, at tað var vert at royna.

Páll leggur kortini dent á, at fyribils er bert talan um skrivstovusamstarv. Advokatvirkini verða rikin á sama hátt. sum tey vóru undan samanleggingini

– Rakstrarliga er tað sjálvsagt ein fyrimunur at leggja saman, sigur Páll Nielsen, sum leggur afturat, at tað ikki er øll orsøkin.

Fakliga hevur tað eisini stóran fyrimun, tí nú eru teir fýra ístaðin fyri tveir.

Tá vit spyrja hann, um teirra fakliga styrki er á hvør sínum øki, sigur hann, at soleiðis er tað ikki.

– Her heima er tað ógvuliga sjáldsamt, at ein sakførari er serfrøðingur á einum øki, tí landið er so lítið.

Kortini er tað ein veruleiki at kanska serliga Páll sjálvur hevur nógv at gera við fakfeløgum, og tí er hann ikki ósamdur í.

– Men tað er í grundini galdandi fyri bæði virkini, sigur Páll.

– Sum nevnt húsast virkini bæði í tveimum húsum at byrja við, men ætlanin er, at tey við tíðini skulu koma undir somu lon.

Nær tað verður og um tað ber til har tey húsast nú, dugir Páll ikki at siga, tí so langt eru tey ikki komin enn.

# Útbjóðingarlógin endaliga samtykt

*-Tá ið landsstýrismaðurin veitir loyvi, skal hann leggja dent á, at leitingar- og framleiðsluvirksemi úr Føroyum, eisini fer fram í útjaðaranum samtykti løgtingið fríggjadagin í einum broytingaruppskoti. Endamálið við hesum er at spjaða virksemið, so ikki eitt pláss ella øki í landinum fær allar avleiðingar – bæði fyrimunir og óhepnar avleiðingar. Tað verður tó ásannað, at tað kann verða trupult at náa hesum endamáli í einum leitiskeiði við avmarkaðum virksemi*



*Eyðun Elttør, landsstýrismaður í oljumálum hevur alla orsøk til at fegnast, nú uppskot hansara varð endaliga samtykt nærum óbroytt.. Men tingið hevur álagt honum at hugsa um útjaðaran, tá virksemi verður í sambandi við oljuleiting og framleiðslu*



*Nú er klárt at lata upp 1. útbjóðing. Helst verður útbjóðingin alment latin upp um einar 10 dagar. Á kortinum síggja vit økið, sum verður boðið út innan fyri trappurnar og marknalinjuna*

so drúgva tíð, og sjáldan hava tingmenn og landsstýrisfólk verið so harðmælt og hatsk móti hvørjum øðrum sum júst í hesum orðaskiftinum, sum byrjaði klokkan 10 og endaði eftir klokkan 13. Tað var spurningurin um, hvar ein komandi oljuútgerðarhavn skal vera, sum varð reyði tráðurin í orðaskiftinum. Eitt uppskot frá Javnaðarflokkinum um at fáa við í standardloyvini, at alt virksemi í sambandi við leitingarskeið og framleiðsluskeið og her eisini oljuðutgerðarhavn skal ganga út frá Suðuroynni, fall.

Í staðin varð eitt annað broytingaruppskot frá tingmonnum í samgonguni samykt. Tað broytingaruppskotið varð soljóðandi:

„Í § 3 verður sett inn nýtt stk. 2, sum verður soljóðandi: „Tá ið landsstýrismaðurin veitir loyvi, skal hann leggja dent á, at leitingar- og framleiðsluvirksemi úr Føroyum, eisini fer fram í útjaðaranum.“

Í viðmerkingunum verður m.a. sagt: „Sum nevnt í álitinum hjá vinnunevndini frá 26. januar 2000, eigur ágóðin av eini møguligari oljuvinnu at koma øllum landinum til góðar – bæði í leitingar- og møguligum framleiðsluskeiði. Hetta er galdandi fyri inntøkur, vinnuframtøk og umsiting. Virksemið kann hava alstórar sosialar, mentanarligar, umhvørvisligar og búskaparligar avleiðingar við sær. Vandi er fyri, at virksemið verður savnað á einum stað og á fáum hondum, og hetta kann hava stóran ójavnað við sær millum samfelagsbólkar og økir í landinum.

Endamálið er at spjaða virksemið, so ikki eitt pláss ella øki í landinum fær allar avleiðingar – bæði fyrimunir og óhepnar avleiðingar. Tað verður tó ásannað, at tað kann verða trupult at náa hesum endamáli í einum leitiskeiði við avmarkaðum virksemi.

Hetta eigur ikki bert at vera eitt politiskt stevnumið, men eitt mál, tá komið verður til ymisku stigini í eini oljumenning. Tí verður tað hildið at vera rætt, at tað í lógini er álagt landsstýrismanninum at leggja dent á, at virksemi verður lagt soleiðis til rættis, at tað gagnar øllum landinum“ siga uppskotsstillararnir. Uppskotið varð samtykt og somuleiðis øll útbjóðingarlógin. Við aðru viðgerð varð uppskot frá andstøðuflokkunum um at fáa eina optión við í uppskoti frá landsstýrinum somuleiðis vrakað. Tískil er lógin til 1. útbjóðing komin ígjøgnum nærum óbroytt.

Nú restar so í at fáa oljuskattafyrisitingarlógina samtykta. Hon hevur verið í Fíggjarnevndini og kemur til 2. viðgerð í dag. Eftir er so at leggja fram uppskot til broytingar í oljuskattalógini. Her er talan um serskattin. Tað uppskotið hevur verið til hoyring hjá øllum flokkum og verður møguliga lagt fyri tingið í dag ella eina av døgunum. Hetta uppskotið er so gott sum tað sama, sum varð kunngjørt á oljumessuni í Aberdeen herfyri.



e-mail: jakup@sosialurin.fo

# Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

## 2 x 22

# 2 x Kyndil





**Steypavinnarar hjá monnum 2000, Kyndil**

***Aftast f.v.:*** Sophus Dahl Christiansen (venjari), Rúni Poulsen, Hans Áki Dahl Christiansen, Niels Viggo Niclasen, Bjarni Wardum, Janus Einar Sørensen, Bár›ur Mikkelsen, Leivur Holm, Hans Andreas Dahl (li›l.)
***Fremst f.v.:*** Rúni Mohr Gunnarson (hjálparv.), Gunnvald Lützen, Uni Wardum, Jacob Jónsson, Hannis Wardum og Regin Petersen. Liggjandi fremst er Lars Winther



**Steypavinnarar hjá kvinnum 2000, Kyndil**

***Aftast f.v.:*** Ann Rubeksen (li›l.), Frida Johannesen, Tina Danielsen, Beinta Sørensen, Ann Hansen, Jensia Petersen, Lotte Sørensen, Bár›ur Johannesen (venjari)
***Fremst f.v.:*** Anya Midjord, Palma Petersen, Elin Michelsen, Jórun Ludvig, Marita Hermansen, Rakul N. Joensen og Semona Fjallstein

Myndir: Jonhard Hammer